# 17 ára gamal gongur á odda


Súkklumenninir komu til Rhodos í góðari tíð
Mynd:Álvur Haraldsen

**Føroyska súkklulandsliðið er á hesum Oyggjaleikunum mannað við eldri og ungum harrum. Geyr Gilsteinsson, hjálparvenjari hjá súkklulandsliðnum, heldur, at tann bert 17 ára gamli Torkil Veihe er sterkasta kortið í hondini**


SÚKKLING
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*


Tvey nýggj andlit eru at finna á føroyska súkklulandsliðnum, sum hevur havt drúgvar fyrireikingar og er væl brynjað til hitan niðri á Rodos. Tveir ungir harrar eru við á fyrsta sinni, og skulu teir saman við royndaru kreftunum manna eitt spennandi landslið

## Ung styrki

Tá ið ein 17 ára gamal er við á fyrsta sinni á Oyggjaleikum, er ikki vanligt, at hesin luttakarin fer at gera nakað serligt um seg frammi í oddinum. Men hesa siðvenju kann føroyska liðið broyta.

- Hann er ein sera sterkur súkklari, og kann væl gera um seg í einkultstartinum, sigur Geyr Gilsteinsson, hjálparvenjari á føroyska landsliðnum, um bert 17 ára gamla Torkil Veyhe úr Havn.

Fleiri ferðir í ár hevur Torkil lagt sjálvasta Gunnar Dahl Olsen aftur um bak, og vunnið á honum.

Sigast skal eisini, at Gunnar somuleiðis má metast sum eitt sera sterkt kort í hondini. 42 ára gamli veteranurin hevur í fleiri ár verið besti súkklarin í Føroyum, og heldur framvegis formin við líka.

## Dáma hitan

Meðan allar ítróttargreinarnar síggja ein stóran vansa í stóra hitanum, sær Geyr Gilsteinsson ein møguligan fyrimun í hesum.

- Tað vísur seg, at vit standa okkum væl í hita, sigur Geyr, og vísur á, at Gunnar vann heiðursmerki í sera nógvum hita í landavegkoyringini á Guernsey í 2003.

Men tað er ikki einans í hita, at súkklararnir hava fingið góð úrslit á Oyggjaleikunum. Á seinastu fýra leikunum hevur súkklulandsliðið nevniliga megnað at vunnið sær heiðursmerki við aftur til Føroya.

Skuldi nógvi hitin stungið seg upp, sum tað á Rodos allarhelst fer at gera, er liðið væl fyrireikað. Liðið hevur verið og súkklað inni í nógvum hita, umfram at hava vant seg við at drukkið sera nógv vant.

## Liðið er sterkari

Geyr sær ongan vansa í, at tveir ungir og óroyndir menn eru komnir á liðið. Heldur hinvegin heldur hann, at hetta hevur styrkt liðið.

- Báðir eru tveir sterkir súkklarar, og Torkil hevur víst sera góð úrslit, sigur hann.

Fyrireikingarnar mugu eisini sigast at hava verið drúgvar og góðar.

- Vit hava fyrireikað okkum út við hálvtannað ár, og hava samlast fýra ferðir um vikuna síðan Novembur í fjør, heldur Geyr fram.

Málið á ársins Oyggjaleikum stendur greitt.

- Málið er at vera við frammi í oddinum og vinna okkum okkurt heiðursmerki, sigur Geyr at enda, og peikar á, at í liðeinkultstartkappingini er hetta væl møguligt.



høvuðsstuðul hjá
landsliðnum í bogaskjóting...
TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari